**27. feb. 2015 varð búmerkið hjá Norðoya Bú- og Heimatænastu avdúkað. Búmerkið er gjørt eftir hugskoti frá Sólgerð Vang, sjúkrarøktarfrøðingi, sum gjørdist vinnari av búmerkjakappingini.**

**Búmerkið skal ímynda eitt træ, við røtrum, træbuli og krúnu:**




**Røturnar ímynda Heimatænastuna**
- Um vit byrja við røtunum á trænum, so skulu tær ímynda Heimatænastupartin av NBH. - Her er talan um heimabúgvandi borgarar, sum enn klára at búgva í egnum húsum, men hava tørv á hjálp.- Her eru tað heilsuhjálparar, heilsurøktarar og heimasjúkrarøktarfrøðingar, sum koma út til borgarar í Norðoyggjum, soleiðis at borgararnir kunnu liva virðilga og sum longst í egnum heimi, sum tey allarflestu eisini ynskja.

**Bulurin ímyndar Bútænastuna**
- Bulurin skal ímynda Bútænastuna í NBH.Her er tað, at allar røturnar savnast og gerast til ein sterkan bul.Tá ið borgarin, sum fyrr var heimabúgvandi, ikki megnar hetta longur, og tænastan, sum verður veitt, ikki megnar at nøkta tørvin, so hava borgararnir tað tilboði, at teir kunnu fara inn á stovn at búgva.Hetta tilboðið eru nógvir borgarar og serliga eisini avvarðandi glað fyri, og kenna seg trygg við, við tað at til ber at fáa hjálp, nátt sum dag.

**Krúnan ímynda tær 6 kommunurnar**
- Krúnan ímyndar restina av borgarunum í kommununum í Norðoyggjum, og teir seks litaðu partarnir á búmerkinum skulu ímynda tær 6 kommunurnar í Norðoyggjum.

**Røturnar og træið hava tørv á hvør øðrum**
- Vit í Norðoyggjum eru eins og træið. Tey, sum undan eru farin, og tey eldru í okkara landi hava bygt samfelagið upp, og eru orsøk til, at vit kunnu blóma og hava tað so gott í dag. Tey hava tøkk uppiborna og eiga at fáa virðiligа røkt. Vit, sum eru á arbeiðsmarknaðinum í dag, eiga at verða røtur fyri tey eldru og harvið orsøk til, at tey kunnu blóma, sjálvt á ellisárum.